gult cyan magenta svart

Ítrottur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Julian og Gravesen á sama liði

Føroyingurin í Noregi og danin í Everton spældu í barnaárunum á sama liði í einum lítlum felag uttanfyri Vejle

Ein føroyskur landsliðsspælari og ein danskur landsliðsspælari umboða sama felag í dag. Talan er um føroyska málverjan Jákup Mikkelsen og liðfelagan hjá honum í Herfølge, Steven Lustü, sum ivaleyst verður á danska beinkinum í kvøld.

Todi Jónsson hevur verið liðfelagi við ein av donsku spælarunum. Tað snýr seg um Bjarne Goldbæk, sum varð seldur úr FCK og til Chelsea, tá Brian Laudrup kom til Keypmannahavnar. Nú umboðar Bjarne Goldbæk Fulham.

Smáu dreingirnir í lítla felagnum

Ein annar av føroysku spælarunum hevur verið liðfelagi við ein av donsku landsliðsspælarnum, men tað er langt síðani. Tað snýr seg um Julian Johnsson, sum í barnaárunum var í sama felagi og spældi á sama liði sum verjukendi miðvallarin og verjuspælarin, Thomas Gravesen:

– Tá eg var smádrongur, búðu vit í Vejle. Eg var longu tá áhugaður í fótbólti, og tað var upplagt, at eg fór at spæla í sama felag, sum vinmenninir hjá mær spældu í. Ein av bestu vinunum á vegnum, har sum vit búðu, æt Thomas Gravesen. Pápi hansara, sum æt Georg, var venjari í einum lítlum felag, sum eitur Daugaard IF. Vit vóru umleið seks ára gamlir, tá vit fóru í felagið, og har spældi eg saman við Thomas og við Georg sum venjara inntil vit fluttu til Føroya at búgva. Tá var eg umleið tíggju ára gamal, minnist Julian aftur á.

Julian heldur tað vera stuttligt, at teir nú skulu umboða hvør sítt landslið. Tá vit tosaðu við Julian, hevði hann ikki hitt Thomas Gravesen, síðani hann kom til Føroya. Bæði føroyska og danska landsliðið hava síðani mánadagin hildið til á Hotel Føroyum, men tey hava einki við hvørt annað at gera. Danir búgva og eta í øðrum endanum, og føroyingar búgva og eta í hinum endanum.

– Eg havi onkuntíð hitt hann síðani barnaárini, men nú er tað nakað síðani. Eftir 1995 kappingarárið var eg í tveir mánaðir í Danmark og vandi við Vejle. Tá spældi Thomas Gravesen har, og eg búði hjá honum. Síðani havi eg ikki havt nakað serligt samband við hann, men sjálvandi havi eg fylgt við, hvussu tað hevur gingist honum í Vejle, Hamburg og nú í Everton. Hann var ein góður fótbóltsspælari, tá vit vóru smádreingir, og tá eg var í Vejle, vóru tað fleiri, sum søgdu, at hann fór skjótt at gerast yrkisspælari í útlandinum, og soleiðis varð tað.

Hóvastákið

Thomas Gravesen hevur spælt átta landsdystir fyri Danmark, og tað hevur ikki verið frítt, at tað hevur verið eitt sindur av hóvastáki rundanum hann. Fyrst varð gamli landsliðsvenjarin, Bo Johansson, endurgivin í donsku presssuni fyri at hava sagt, at hann kundi ikki brúka Thomas Gravesen á landsliðnum, um hann ikki dugdi at bera seg at í Hamburg SV. Venjarin segði seinni, at hann hevði ikki verið so harðligur í sínari útsøgn, sum fjølmiðlarnir høvdu gjørt tað til, og Gravesen kom aftur á landsliðið.

Í summar flutti Gravesen úr Hamburg og til Everton. Í einum tí fyrsta venjingardystinum fekk hann reyða kortið, og í donsku pressuni varð nógv gjørt burturúr. Seinni vístu upptøkurnar, at dómarin hevði verið ov eirindarleysur, og at hann ikki átti at havt givið meiri enn gula kortið.

Stórt sjálvsálit

Tað hevur hesa seinastu tíðina gingið væl hjá Juliani Johnsson og hinum føroyingunum í Sogndal. Tað er hugaligt, og tað styrkir sjálvandi um sjálvsálitið:

– Áhugin fyri felagnum økist saman við møguleikanum at flyta upp. Í Sogndal eru sjey unglingalandsliðsspælarar, og tað verður nú tosað um, at onkur teirra skal seljast til útlandið. Gerst hetta veruleiki, so viknar liðið og harvið møguleikin fyri at flyta upp. Mest verður tosað um álopsfelagan hjá Kurt Mørkøre, Tommy Øren. Hann er 19 ára gamal, og hann er sera evnaríkur.

Men hvør er orsøkin til, at tað nú gongst tykkum so væl?

– Høvuðsorsøkin er Kurt Mørkøre. Hann hevur verið framúr í ár. Eg havi altíð vitað, at hann hevur verið málsøkin, men at hann var so góður sum boksspælari, tað havi eg ikki vitað fyrrenn nú eg havi sæð tað í summar.

Hans Fróði Hansen hevur vunnið sær pláss í miðverjuni. Tað er alneyðugt hjá honum at vera sannførandi hvørja ferð, tí á beinkinum situr ein ungur og góður miðverji og bíðar. Julian Johnsson er altíð á miðvøllinum:

– Mær hevur altíð dámað væl at fáa høvi at blanda meg uppí alla staðni, men í Sogndal er mær álagt at vera í høgra borði. Mær er álagt at renna nógv aftur og fram, og tað líkar mær væl. Tað verður roknað við, at eisini eg leggi bóltar innfyri til Kurt Mørkøre, og tí havi eg vant sera nógv at leggja bóltar innfyri.

Hvussu verður í kvøld?

– Nú fáa vit at síggja, hvussu venjarin fer at seta liðið. Eg eri sera spentur, og eg ivist ikki í, at teir, sum sleppa upp í part, fara at gera alt, sum tað ber til, fyri at fáa eitt gott úrslit á Tórsvølli og frammanfyri seks túsund áskoðarum. Fyritreytirnar áttu at verið til tað, tí hesa tíðina av árinum eiga allir spælararnir at vera í so góðari venjing, sum tað ber til.

jh

8 útisetar á føroyska liðnum

Hesa ferð verða ikki fleiri enn tríggjar spælarar úr heimligu kappingi ímillum teir fyrstu ellivu á vøllinum

Tað eru so nógvar dimensiónir í landsdystinum í kvøld. Tveir av portunum í ríkisfelagsskapinum ímóti hvørjum øðrum, tann lítli ímóti tí stóra, Allan Simonsen ímóti Morten Olsen og Michael Laurdup – teir eru allir millum mest avhildnu fótbóltsspælararnar í Danmark nakrantíð – og soleiðis kundu vit hildið á. Tað verður spælt upp á politisku undirtónarnar, at tað er spurningurin um fullveldið, sum stendur upp á spæl. Onkur hevur í ramasta álvara sagt, at um føroyingar megna eitt gott úrslit í kvøld, so hevði tað verið lættari at fingið meiriluta, um fólkaatkvøðan hevði verið 14. september, men tey munnu neyvan vera mong, sum taka støðu til framtíðina hjá Føroyum úti frá, hvussu tað fer at gangast, tá tað verður telvast á grasinum.

Í tí sambandinum (har var aftur eitt politiskt løtt orð!) er tað merkisvert, at tann størri parturin av teimum ellivu føroyingunum, sum undan dystarbyrjan úti á vøllinum vónandi fara at hoyra ein brúsandi tjóðsang frá stóru áskoðarafjøldini, ikki búgva í Føroyum. Av teimum átjan, sum halda til á Hotel Føroyum saman við Allani Simonsen, spæla bara átta í tí heimligu kappingini, og tað er neyvan at skjóta við síðuna av at siga, at bara tríggir úr heimligu kappingini verða millum teir fystu ellivu.

So nógvir útisetar hava ongantíð verið ímillum teir fyrstu ellivu áður.

Ikki á tindinum

Teir átta, sum spæla í 1. deild heima á landi, eru Jens Kristian Hansen, Henning Jarnskor, Rógvi Jacobsen, Øssur Hansen, Jan C. Dam, Fróði Benjaminsen, Jóhannes Joensen og Allan Mørkøre, sum inntil fyri stuttum var útiseti.

Felags fyri allar hesar átta hevur verið, at teir í ár ikki hava verið á sama støði, sum teir vóru í fjør. Fleiri hava verið plágaðir av skaðum, og tískil eru teir ikki í tí dystarvenjingini, sum skal til, og aðrir hava verið merktir av, at liðið, sum teir spæla á, ikki hevur havt tann undanvindin, sum ber sjálvsálit við sær og ger tað hugaligt at spæla.

Øssur Hansen man vera tann av heimligu landsliðsmonnunum, sum hevur verið mest eyðsýndur higartil í ár. Hann verður ivaleyst í vinstru síðu.

Allan Simonsen setur stóran prís upp á nógvar royndir. Allan Mørkøre hevur verið plágaður av vøddaskaða, men nú verður sagt, at hann er klárur at spæla, og tí verður hann á vongverjanum í høgru. Jens Kristian Hansen, sum altíð stendur seg væl í landsdystum, er sjálvskrivaður í miðverjuni. Henning Jarnskor fer á beinkinum at vera klárur at loysa Allan Mørkøre ella Øssur Hansen av, Jóhannes Joensen kann brúkast á øllum verjuplássunum, Jan Dam kann loysa av í miðverjuni, har kann Fróði Benjaminsen eisini brúkast umframt á miðvøllinum, og Rógvi Jacobsen verður eykamaður á framrættaða miðvallarplássinum og í álopinum.

Tveir verða sáldaðir frá

Av teimum tíggju útlendingunum mugu tveir finna seg í at sita á beinkinum. Jákup Mikkelsen ella Jens Martin Knudsen verður málverji. Tann, sum ikki fer at standa í málinum, fer at sita á beinkinum. Jákup hevur ikki verið í landsliðshópinum síðani í oktober. Ta ferðina var hann á beinkinum, meðan Jens Martin vardi málið í Prag. Valið hesa ferð boðar frá, hvønn venjarin ætlar at hava í málinum í undankappingardystunum í heyst. Tað er tó ein møguleiki, at hann velur at geva teimum ein hálvleik í part.

Óli Johannesen og Hans Fróði Hansen verða í miðverjuni saman við Jens Kristiani Hansen. Á miðvøllinum verður enn ein royndgjørd við Sámali Joensen, Julian Johnsson og John Petersen.

Síðsti spurningurin er, um tað verður Uni Arge ella Kurt Mørkøre, sum verður við síðuna av Toda Jónsson í álopinum.

Á plusssíðuni hjá Una Arge telur, at hann hevur skorað fleiri mál (tað síðsta gjørdi hann, tá Føroyar vunnu 1–0 í Liktinstein). Á minussíðuni hjá honum er, at hann síðani ferðina í Liktinstein í fleiri vikur var uttanfyri, tí hann var skaddur. Á plusssíðuni hjá Kurt Mørkøre telur, at hann hevur verið sera væl upplagdur í norskum fótbólti, har hann er toppskjútti í næstbestu deildini. Tað eigur at styrkja um sjálvsálitið.

jh

Fyrstu ferð Allan ikki heldur við Danmark

Venjarin hjá føroyska liðnum setur úrslitið hægst í kvøld, men hann heldur samstundis, at mótstøðuliðið í kvøld ikki er so ólíkt Slovenia, sum kemur til Føroya um góðar tvær vikur

Hann heldur, at tað er eitt sindur undarligt, men sum professionellur fótbóltsmaður er tað eingin trupulleiki hjá honum. 3. juli í 1972 var Allan Simonsen fyrstu ferð á danska landsliðnum. Tað var í Reykjavík, har Danmark vann 5–2, og Allan Simonsen skoraði tvey av málunum.

Merkisvert ta ferðina var, at Morten Olsen stutt frammanundan so at siga hevði diskvalifiserað seg sum landsliðsspælara. Tá í tíðini góðkendu danir ikki yrkisspælarar. Morten Olsen var á landsliðnum, sum 29. juni í 1972 vann 2–0 í Svørriki, men hann var ikki við í Íslandi og í olympisku kappingini í Vesturtýskalandi, tí hann hevði skrivað undir sáttmála við útlendskt felag. Í 1974 góðtóku danir, at yrkisspælarar komu á landsliðið, og eftir hetta rakk Morten Olsen 102 landsdystir í alt – nógvar av teimum saman við justi Allani Simonsen.

Allan hevur 56 ferðir umboðað føðilandið. Í kvøld verður tað fyrsta ferðin, at Allan Simonsen fer at stríðast ímóti føðilandinum, og Morten Olsen og Michael Laurdup, sum hann var á landsliðnum saman við nakrar ferðir.

– Tað er eingin trupulleiki. Tað snýr seg um at fyrireika seg til tað, sum fer fram á vøllinum. Har verður tað trupult hjá okkum, men vit fara at gera alt tað, sum tað ber okkum til. Áskoðaraplássini vera á tremur, og eg haldi, at áskoðararnir hava uppiborið allan tann stuðul, sum teir kunnu fáa. Hvussu tað fer at laga seg veldst um so nógv, m. a. um hvussu byrjanin lagar seg.

Hvat hevur størst týdning fyri teg í kvøld?

– Vanliga verða vinardystir bráktir til at fyrireika seg til undankappingardystir, og so plagar úrslitið at koma í aðru rað. Ímóti Danmark er tað øðrvísi. Vit vita øll, at tað er nakað heilt serligt, at Føroyar og Danmark spæla landsdyst, og eingin ivi skal vera um, at tað snýr seg um at fáa eitt so gott úrslit, sum tað á nakran hátt ber til. Vit senda tað liðið á vøllin, sum vit halda er tað besta. Vit rokna ikki við at brúka fleiri skiftisspælarar, enn altjóða reglarnir áseta. Talan er um NM kappingardyst. Tað er stutt tíð til fyrsta undankappingardystin, og tað er týdningarmikið, at umstøðurnar hesa ferð líkjast nógv teimum næstu ferð. Men um Morten Olsen ynskir at brúka fleiri enn tríggjar skiftisspælarar, so kunnu vit tosa um tað.

Liðavrikið er styrkin

Vil tað siga, at Slovenia dysturin ikki er so framm-araga í huganum, tá tú gongur so høgt uppí at fáa eitt gott úrslit ímóti Danmark?

– Als ikki. Eg sá allar dystirnar hjá Slovenia í EM kappingini. Teir eru ikki so lítið átøkir danska liðnum. Munurin er kanska tann, at teir hava onkrar individualistar, sum kunnu útrætta meiri einsamallir, enn teir á danska liðnum kunnu. Styrkin hjá danska liðnum er avgjørt liðavrikið.

Hetta er øðrvísi, enn tá tú spældi á landsliðnum?

– Tá vóru fleiri danskir spælarar í størstu feløgunum í Europa, har teir vóru lyklaspælarar og kundu útrætta nógv einsamallir. Nú er tað øðrvísi. Hví tað er øðrvísi, kundu vit tosa leingi um, men nú eru donsku útisetarnir meiri liðspælarar í feløgum, sum ikki eru millum tey fremstu, og tað ávirkar sjálvandi, hvussu landsliðið spælir.

Fleiri eru á veg

Landsliðsvenjarin staðfestir, at hesa ferð eru fleiri útisetar á føroyska liðnum, enn at tað eru úr heimligu kappingini. Hann vil ikki siga nakað um, hvørjir fara at byrja á vøllinum, men hann ásannar, at tað er sannlíkt, at útisetarnir vera fleiri enn heimligu spælararnir:

– Vit hava spælarar í Danmark, Noregi og Íslandi, og teir eru profilar á landsliðnum. Danir hava eisini heilt nógvar útisetar á teirra liði, og hesir eru profilar. Soleiðis er gongdin.

Tað tykist vera torført hjá heimligu spælarunum at koma á liðið?

– Eg var í Gundadali sunnudagin og sá NSÍ vinna 5–2 á HB. Tað sigur seg sjálvt, at spælarar, sum útmerka seg, koma nærri landsliðnum. Tað skulu fleiri støðug og góð avrik til, men tað sigur seg sjálvt, at eitt nú Christian Høgni Jacobsen er ikki langt frá landsliðnum. Hetta er kortini einki nýtt. Eg hevði lagt merki til hansara, áðrenn hann breyt beinið, og tað er gleðiligt, at hann aftur tykist vera førur fyri at brúka góðu evnini.

jh

Danir mugu vinna

Eftir miseydnaða EM-endaspælið, er einki uttan ein sannførandi sigur nóg gott hjá danska landsliðnum í dag

Eyðun Klakstein

Danir hava einki at vinna, alt at tapa, tá teir í dag fara at takast við føroyska fótbóltslandsliðið á Tórsvølli.

Nýggja venjaraparið, Morten Olsen og Michael Laudrup, standa fyri fyrstu ferð á odda fyri danska landsliðnum, og teir taka dystin í dag í stórum álvara.

– Vit hava virðing fyri føroyingunum, tí teir hava tikið seg nógv fram, síðani vit spældu ímóti teimum fyri 10 árum síðani. Í dag eru tað einir lættir dystir í landsliðsfótbólti, sigur Michael Laudrup, fyrrverandi stórspælarin á danska landsliðnum.

Morten Olsen sigur, at hann altíð fer at spæla við trimum álopsspælarum á danska landsliðnum, men hann kennir seg ikki vísan í, um hann fer at spæla við trimum ella fýra monnum í verjuni. Tað kemur venjingin at vísa.

– Vit fara at spæla økonomiskan fótbólt, tað vil siga, at vit skulu royna at hava bóltin nógv, tí tað er minst troyttandi hjá spælarunum, sigur nýggi landsliðsvenjarin, sum hevði sína fyrstu venjing við danska landsliðnum mánakvøldið.

Í gjár vandi danska landsliðið aftur á Tórsvølli, men tað var tað fyri afturlætnum hurðum.

Spælararnir skulu vísa nakað

Tá nýggir landsliðsvenjarar taka við, eru tað ikki bara spælarar og viðhaldsfólk, sum eru spent uppá, hvat fer at henda.

Eisini spælararnir fylgja væl við.

– Tá nýggir landsliðsvenjarar verða settir, kanst tú rokna við nøkrum broytingum, og tí fylgja spælararnir við, hvørjir spælarar eru upp á tal og hvat landsliðsvenjararnir ætla. Og tað sæst eisini á tí fyrstu úttøkuni, at nakrar broytingar eru gjørdar, sigur Allan Nielsen, sum er ein av teimum, sum hevur drúgvar royndir á danska landsliðnum.

– Eg rokni við, at nýggju venjararnir fara at halda fast um at danska landsliðið skal spæla positivan álopsfótbólt, sigur hann.

Verjuspælarin, René Henriksen, roknar við, at spælararnir fara at fáa leysari teymar til at spæla bólt í framtíðini.

– Munurin millum Morten Olsen og Bo Johansson er helst, at Morten Olsen er meira smidligur og fer at loyva spælarunum at spæla meira frítt, sigur verjuskansin, sum fær týðandi leiklut á landsliðnum hjá nýggju venjarunum.

Undirmeta ikki Føroyar

Morten Olsen tykist ikki á nakran hátt at rokna við eini lættari uppgávu á Tórsvølli í kvøld

Eyðun Klakstein/
Jákup Mørk

- Vit ætla okkum ikki á nakran hátt at undirmeta føroyska liðið. Hetta vóru fyrstu orðini hjá danska landsliðsvenjaranum, Morten Olsen, tá danir um middagsleitið í gjár hildu tíðindafund.

Stór menning

Hann vísti á, at Føroyar seinnu árini hava fingið fleiri góð úrslit, og at tað serliga er á heimavølli, at hesi eru fingin til høldar: - Millum annað fingu tit ein flottan javnleik móti skotum, eins og tit vóru sera nær eini sensatión móti kekkum, segði danski venjarin fryntliga.

Annars helt hann, at talan her var um eitt mótstøðulið, sum hevur verið í stórari menning, og hann gav eisini fyrrverandi landsliðsfelaganum, Allan Simonsen, stóran part av æruni fyri. Hann helt, at landsmaðurin hevði givið Føroyska landsliðnum sera nógv, bæði sum venjari og ígongdsetari.

Harumframt legði hann afturat, at tað at nógvir føroyskir leikarar nú royna seg uttanlands, eisini er av alstórum týdningi fyri menningina av fótbóltinum her á landi.

Mugu vera uppsettir

At donsku leikararnir skulu taka dystin í álvara, var venjarin sostatt als ikki í iva um:

- Vit eru noyddir at taka dystin í stórum álvara, tí eingin ivi er um, at føroyingar leggja nógv fyri. Roknað verður við hollum stuðli frá einum fullsettum stadion, og hetta er ivaleyst eisini eggjandi hjá føroyska leikarunum.

Álopskent

Spurdur um donsku spælistættanina, segði Morten Olsen, hon allarhelst verður nóg so framrættað.

Hann roknaði við, at talan fór at vera um fimm álopskendar leikarar, men hann segði tó einki um, hvussu býti av hesum verður millum miðvøll og álop.

Eisini vísti hann á, at um umstøður eru til tess, er ætlanin at royna so nógvar leikarar sum gjørligt, og tað tí kann gerast talan um nógvar útskiftingar.

Hann tordi ikki at lova nakað hesum viðvíkjandi, tí hann metti úrslitið av dystinum at koma í fremstu rød.

Sostatt er bert at vóna, at talan í kvøld verður um fáar útskiftingar frá danska beinkinum.